# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Seinastu skjølini vísa, at CIA njósnaðist meiri í USA enn uttanlands júst sum Stasi í gamla DDR*

*(New York Times)*

# Burma onga virðing fyri mannarættindum

**Morð, álop og neyðtøkur eru gerandiskostur, og fangar verða brúktir sum trælir, sigur Altjóða Reyði Krossur**

Nógvar frágreiðingar, sum eru komnar um framferðina hjá hernaðarstýrinum í Burma (Myanmar), hava verið atfinningarsamar, men eingin hevur tó verið so hvassorðað sum tann seinasta frágreiðingin, sum Altjóða Reyði Krossur hevur kunngjørt í dag.

Í frágreiðingini verður sagt, at hernaðarstýrið hevur onga virðing fyri altjóða mannarættindunum, og at brot sum dráp, ágangur og neyðtøkur eru gerandiskostur. Tað er herurin, sum stendur fyri harðskapinum, og tað er serliga sivilfólkið á markinum við Teiland, sum er fyri áganginum. Í fleiri førum hevur herurin eisini sett eld á matvørur og framleiðslutól.

ICRC sigur, at herurin fer ógvuliga illa við fangum. Fleiri túsund fangar verða brúktir til at bera mat og herútgerð fyri hermenninar, og tað er greitt brot á altjóða reglurnar.

-Vit hava fleiri ferðir verið í sambandi við hernaðarstýrið í Myanmar og sagt okkara hugsan um tess framferð, men enn er einki hent, sigur Jakob Kelleberger, sum er forseti í Altjóða Reyða Krossi.




*Í Burma eru allar mótmælisgongur bannaðar, men her eru tað fólk í Indonesia, sum krevja broytingar í Burma*

# Grønland skal hava endurgjald fyri veðurlagsbroytingar

**Tað heldur í hvussu er tann nýstovnaði fiski- og veiðimannaflokkurin**

Á vitjanini í Grønlandi fyri nøkrum døgum síðani máttu Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, og José Manuel Baroso, ES-nevndarformaður, ásanna, at tann veksandi hitin á Jørðini hevur størri ávirkan í Grønlandi enn aðrastaðni.

Júst tí eiga grønlendingar at fáa endurgjald fyri veðurlagsbroytingarnar, sigur tann nýstovnaði fiskiog veiðimannaflokkurin Aalisartut Piniartullu, sum nú fer runt landið at savna undirskriftir fyri kravinum. Tær skulu so sendast ES og ST.

- Tað er eingin ivi um, at tann mannaskapta dálkingin í ídnaðarlondunum hevur vanlukkuligar avleiðingar fyri grønlendska samfelagið, sigur formaðurin í nýggja flokkinum, Leif Fontaine, við útvarpið í Nuuk.

# Við Guðs hjálp

**George W. Bush og Fidel Castro eru ikki vinmenn, men báðir hava álit á Guði**

- Ein dag man Guð fara at beina Fidel Castro av vegnum, segði George W. Bush, forseti, í einari røðu fyri herflotamonnum á einari flotastøð í Rhode Island í gjár.

Kubanski forsetin var ikki seinur at svara. Í einum skemtiligum teldubrævi til tær útlendsku tíðindastovurnar í Havana takkaði hann Guði fyri at hava hildið hondina yvir sær øll tey nógvu árini.

- Nú skilji eg, hví ætlanirnar hjá Bush og fyrrverandi amerikonskum forsetum at beina fyri mær eru miseydnaðar. Tað er sjálvandi tí, at Guð hevur vart meg, skrivar tann 80 ára gamli Castro speirekandi.





*Teir eru í hvussu er samdir um at hava álit á Guði*

## STUTT SAGT

### Flogbann

Frá 1. juli sleppa indonesisk ferðamannaflogfør ikki at flúgva til flogvallir í ES-londunum. Orsøkin er, at trygdin umborð á teimum indonesisku flogførunum er ikki nóg góð. Higartil í ár eru tvey indonesisk flogfør dottin niður, og tær báðar vanlukkurnar kravdu ávikavist 96 og 22 mannalív. ES hevur eisini bannað tveimum øðrum flogfeløgum at senda flogfør til flogvallir í limalondunum. Tað eru angolska felagið TAAG Angola Airlines og tað ukrainska Volare, sum flýgur við farmi.

### Tosar við Kina

Í dag eru umboð fyri útlagna tibetanska leiðaran Dalai Lama farin til Kina at tosa við umboð fyri kinesisku myndugleikarnar. Umboðini skulu vitja Shanghai og Beijing, og tað ljóðar, at ørindini eru millum annað at kanna, um Dalai Lama kann sleppa á eina pílagrímsferð til Kina. Hetta er fimtu ferð síðani 2002, at umboð fyri Dalai Lama eru í Kina, men higartil er lítið komið burtur úr ferðunum. Kina hersetti Tibet í 1950, og í 1959 noyddist Dalai Lama at flýggja til India eftir ein miseydnaðan uppreistur.

### Bush tapti

Tað gongst illa hjá George W. Bush, forseta at fáa nakað uppskot ígjøgnum Kongressina í hesum døgum. Í gjár royndi hann við einari nýggjari lóg um ólógligar innflytarar, men Senatið sýtti fyri at taka støðu til tað. 46 senatorar søgdu seg vera sinnaðar at atkvøða um uppskotið, men tað rakk ikki, tí minst 60 skuldu taka undir við at atkvøða.